
Minningarorð um D.P.



Staddur á skipi í Eystursjónum á veg til Sovjetsamveldið, frætti eg, at D.P. er deyður. Hóast hetta var væntandi, tí D.P. hevði fingið álvarsligt mein av einum hjartatilburði nakrar dagar framman undan, so vóru hetta tung boð at fáa. Ein lítil, men innilig vón um at D.P. skuldi koma fyri seg aftur, og halda fram við sínum politiska og skaldsliga yrki, sum hann dýrmetti so høgt, er brostin.

Eingin sum var á aðalfundinum hjá Sosialistiska Loysingarflokkinum 16. mars ella til borðhaldið aftaná, varnaðist, at D.P. skuldi fara so brádliga frá okkum. Bæði kropsliga og andaliga var hann ein unglingi. Altíð til gongu. Tólv tímar arbeiðsdag líka til tað síðsta. Skjótthugsandi. Skemtingarsamur. Treivst millum yngra ættarliðið. Í góðum hýri. — Soleiðis kendu vit D.P.

D.P. livdi eitt ríkt lív. Umframt sakførarayrkið, hevði hann nógv onnur jørn í eldinum. Og sum tann hugsandi og arbeiðssami maður hann var, fekk hann nógv frá hondini.

Hann byrjaði sítt politiska lív millum útisetar í Keypmannahavn, og gjørdist loysingarmaður. Heimkomin aftan á kríggið fór hann upp í stríðið fyri loysing. Undan fólkaatkvøðuni í 1946 ferðaðist hann saman við Erlendi o.ø. landið runt og talaði fyri loysing. Fólkaatkvøðan kom, og meiriluti var fyri loysing. Hesin fólkaviljin var skammiliga skúgvaður til viks, og í staðin fingu vit eina heimastýrislóg, sum á ongan hátt uppfylti frælsisynski fólksins.

Nú allir flokkar gingu sambandskós, gjørdist D.P. saman við Erlendi o.ø., ein av oddamonnunum fyri stovnan Tjóðveldisfloksins. Sjálvur annar bleiv hann fyrstur at umboða flokkin á løgtingi. Hann sat á tingi í tvey valskeið, frá 1950-1958, valdur fyri Vága valdømi.

D.P. kundi sitið longri á tingi, um hann vildi, tí hann hevði stóra undirtøku í Vágum. Men hann vildi ikki. — Hann var komin til eitt vegamót. »Politiska smáligheitin á tingi troyttaði meg, har var eingin sakligheit at finna, og sjabbið um samband ella loysing gav mær onga meining«. Sum D.P. sjálvur tók til.

Í hesum tíðarskeiðnum var D.P. farin at hugsa meira sosialistiskt. Hann las íslendskar og europeiskar bøkur um sosialismu, og hann las sosialistisk tíðarrit. Hann tvinnaði spurningin um loysing og samfelagsligt rættvísi saman við spurninginum um sosialismu. Henda støðutakan hansara gjørdi, at hann kom at standa uttan fyri Tjóðveldisflokkin framyvir.

Men D.P. gavst ikki. Bæði innan fyri Oyggjaframa og sum einstaklingur helt hann fram við sínum politiska virksemi. Hann gjørdist ein ótroyttiligur stríðsmaður fyri sosialismu.

Tað eru so mong, sum hava verið reyð sum ung, men sum seinni lata seg falla til innan fyri samfelagsins rammur. Vilja hava eitt bein at gnaga. Ála seg upp eftir samfelagsins slímutu trappum. Gerast góð við búkin, men andaligar rukkur. Gerast borgarlig. Soleiðis var ikki við D.P. Hann gjørdist meira politiskt búgvin og sannførdur kollveltingarmaður við aldrinum.

Hugsan D.P. um felagsskap heldur enn sjálvdrátt gjørdi, at hann í samvinnufelagnum, og seinni í útróðrarmiðstøðini,• arbeiddi við sølu av fiski fyri fiskimenn og útróðrarmenn. Í samvinnufelagnum og í Meginfelag Útróðrarmanna virkaði D.P. til tað síðsta.

Fyrst í sjeytiárunum vóru boð eftir D.P., hesaferð var tað EEC hóttanin, sum lúrdi. Hann ferðaðist saman við øðrum landið runt, og talaði ímóti EEC limaskapi. Hann var ein av høvuðsstuðlunum í fólkafylkingini ímóti EEC.

D.P. tók virkin lut í útróðrarverkfallinum í 1975. Hann stuðlaði fult og heilt krøvum útróðrarmanna. Politikararnir vildu ikki tosa við útróðrarmenninar. Tí tók D.P. stig til at steingja Oyggjarvegin og seta blokadu í verk ímóti bankunum, fiskasøluni og gjaldstovuni.

Eg hevði hoyrt um D.P. Hoyrt hann tala. Og Roðan las eg trúðliga. Men persónliga kom eg ikki at kenna D.P. fyrr enn síðst í sjeytiárunum.

Í 1977, tá 20 EEC ráðharrar samráddust við landsstýrið í Havnar klubba um ein rammusáttmála millum Føroyar og EEC, hildu vit mótmælisfund á Tinghúsvegnum og í Læraraskúlahøllini.

Seinni sama ár, tá Alexander Iskov var og samráddist um russarasáttmálan, hildu vit mótmælisfund á Vaglinum.

Áðrenn løgtingsvalið í november 1978, hildu vit fundir runt um í landinum. Vit avdúkaðu løgtingsflokkarnar og serliga følsku arbeiðaraflokkarnar, og greiddu frá sosialistiska alternativinum.

Á reyðu summarlegunum, sum Oyggjaframi skipaði fyri síðst í sjeytiárunum og fyrst í áttatiárunum, var D.P. fastur og fúsur. Hann helt fyrilestrar, luttók í kjakinum og smæddist ikki burtur ímillum í ítróttarkappum og á kvøldsetum.

D.P. var eisini við á 1. mai haldum og 14. septemberhaldum, har hann ofta førdi fram talu.

Undir sjómannaverkfallinum í 1981 var D.P. blokaduvakt á Havnar kei. Sum sakførari mótmælti hann politiharðskapinum. Og tá blokaduvaktirnar blivu rættarforfylgdar, gjørdist hann verji hjá teimum.

D.P. var við í mótmælistiltaki uppi á Marinustøðini, har hann saman við øðrum mótmælti uppsetingini av hernaðarligum antennum, sum útlendska hervaldið setti upp. »70 ára gamlir fremja dreingjastrikur«. Skrivaði okkurt blað. Nei, D.P. framdi ongar dreingjastrikur. Hann var av fullum huga ímóti øllum útlendskum hervaldi í Føroyum.

Seinasta politiska virksemið hjá D.P. kom at verða í Sosialistiska Loysingarflokkinum. Hann var ein av stovnarum floksins, og kom í stóran mun at mynda politikkin hjá flokkinum. Hann sat í starvsnevnd floksins frá stovnan til hann nú doyði.

Aðalfundurin hjá Sosialistiska Loysingarflokkinum 16. mars gjørdist seinasti dagur hjá D.P. Hann hevði glett seg til fundin, tí hann vildi hava alt tað formella frá hondini, so flokkurin kundi fara veruliga til verka.

Á fundinum hevði D.P. orðið. Hann tosaði um støðuna í samfelagnum, og vísti á, at bert sosialisman kann fáa okkum burtur úr búskaparliga og vinnuliga óførinum. Seinastu orðini, D.P. segði, havi eg lagt mær í geyma. »Hendingarnar eystanfyri eru ikki tekin um, at sosialisman er ónýtilig. Tað eru heilt aðrar orsøkir til tað, sum har er farið fram. Sosialisman er framvegis einasta loysnin uppá ta neyð og elendigheit, sum stórur partur av heiminum er í«.

Missurin av D.P. er ein dyggur smeitur fyri Sosialistiska Loysingarflokkin. Men hava vit hansara treysti, skulu vit einaferð náa á mál.

D.P. var ein skrivandi maður. Hann gav einsamallur tíðarritið Roðan út í mong ár. Seinni fór hann at skriva í Fríu Føroyum. Hann skrivaði eisini bøkur. Nevnast kunnu »Tølini tala«, »Hvat fæst frá tí almenna«, og stórverkið »Búskapur søguliga lýstur«. Hann hevur eisini skrivað eina ferðafrásøgn frá einari ferð í Íslandi. Seinasta bók hansara er ein skaldsøga, »Hvørt við sínar náðir«, sum er um niðursetufólkini á Hvítanesi.

 Eg veit, at nógv skrivligt tilfar liggur eftir D.P. Tað er at vóna, at tað verður givið út, so vit onnur kunnu fáa gleði av tí.

Æra veri minnið um D.P.

Dánial J. Jacobsen

Viðvíkjandi næmingum úr Havn í Argja skúla

Nú Tórshavnar býráð hevur avgjørt at taka sínar næmingar úr Argja skúla, so taka vit tað til eftirtektar.

Vit høvdu tó vónað, at teir næmingar, ið høvdu byrjað skúlagongdina í Argja skúa, vórðu her, til skúlagongdin var lokin.

Til kunningar skal nevnast, at landsskúlamyndugleikarnir hava tillutað skúlaverkinum undirvísingartímar eftir næmingatali og ikki eftir, hvussu nógvir slokkar eru í kúlanum. Ut frá hesum veruleika fer Argja skúli nú at miða ímóti at fáa so nógvar undirvísingatímar til næmingarnar, ið eru búsitandi á Argjum, sum til ber.

Málið kemur sum skjótast til viðgerðar í skúlanevndini á Argjum.

Foreldur og næmingar í Havn skulu nú taka tað sum givið, at ewingir næmingar, búsitandi í Tórshavnar kommunu, verða næsta skúlaár í Argja skúla.

Ólavur Petersen,
skúlanevndarformaður
í Argja kommunu

sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sos

Ja! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.**
Haldaragjaldið er kr. **200,-** fyri ársfj.
Haldarar uttanlands gjalda kr. **235,-**/ársfj.
Goldið verður ongantíð fyri fleiri bløð enn tey, ið eru eftir at koma í einum ársfjórðingi.

Okeypis
Sosialurin
rindar
postgjaldið
64

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Bygd/býur: ____________

tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Kannað postverkinum